# Nes Sóknar Ítróttarfelag

Postboks 173
610 Saltangará

# Ársfrásøgn 2018

V-tal: 345326

---

Ársfrásøgnin er framløgd og góðkend av ársaðalfundi felagsins hin / 2019

Fundarstjóri:

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| Leiðsluátekning | 3 |
| Váttan frá óheftum grannskoðara | 4 |
| Leiðslufrágreiðing | 6 |
| Nýttur roknskaparháttur | 7 |
| Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. december 2018 | 9 |
| Fíggjarstøða tann 31. december 2018 | 10 |
| Peningastreymsyvirlit | 12 |
| Notur til ársroknskapin | 13 |

# Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið:** | Nes Sóknar Ítróttarfelag<br>Postboks 173<br>610 Saltangará | |
| **Felagsháttur:** | Ítróttarfelag | |
| **V-tal:** | 345326 | |
| **Roknskaparár:** | 1. januar - 31. december 2018 | |
| **Samanberingarár:** | 1. januar - 31. december 2017 | |
| **Grannskoðan:** | GrannskoðaraStovan í Runavík Spf.<br>Skrásett grannskoðanarvirki<br>Heiðavegur 31, 600 Saltangará | |
| **Peningastovnur:** | Betri Banki, BankNordik, Norðoya Sparikassi og Suðuroyar Sparikassi | |
| **Nevnd:** | Dánial Hansen | Formaður |
| | Oddfríður Gaardbo | Næstformaður |
| | Arnfinn Langgaard | Kassameistari |
| | Oddvør Jacobsen | Skrivari |
| | Bergmann Finnson | Nevndarlimur |

# Leiðsluátekning

Leiðslan hevur í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri 1. januar - 31. december 2018 hjá fótbóltsfelagnum Nes Sóknar Ítróttarfelag.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini, og uppsetingin er tillagað eftir krøvunum í 'Faroe Islands Football Association Club Licensing Regulations, edition 2019'.

Vit meta, at ársroknskapurin gevur eina rættvísa mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu felagsins tann 31. december 2018 umframt av úrsliti felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. december 2018.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur eftir okkara fatan eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Saltangará, tann 31. januar 2019

**Nevnd**

Dánial Hansen
*Formaður*

Oddfríður Gaardbo
*Næstformaður*

Arnfinn Langgaard
*Kassameistari*

Oddvør Jacobsen
*Skrivari*

Bergmann Finnson
*Nevndarlimur*

# Váttan frá óheftum grannskoðara

**Til nevndina í Nes Sóknar Ítróttarfelag.**

**Niðurstøða**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Nes Sóknar Ítróttarfelag fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2018 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum, íroknað nýttum roknskaparhátti. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini og uppsetingin er tillagað eftir krøvunum í Faroe Islands FA Club Licensing Regulations, edition 2019.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember 2018 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2018 samsvarandi ársroknskaparlógini, tillagað eftir krøvunum í Faroe Islands FA Club Licensing Regulations, edition 2019

**Grundarlag undir niðurstøðuni**
Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir fyri grannskoðan og aðrar ásetingar í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er neyvari útgreinað í brotinum niðanfyri "Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum í samsvari við altjóða etisk krøv fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum, og hava fylgt etisku skyldunum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Okkara fatan er, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina, tillagað eftir krøvunum í Faroe Islands FA Club Licensing Regulations, edition 2019. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir krevst fyri, at ársroknskapurin kann verða gjørdur uttan týðandi skeivleikar, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, er tað ábyrgd leiðslunnar at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og, har tað hevur týdning, at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, at gera ársroknskapin eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella, at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika.

**Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin**
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan, og ásetingunum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um teir eru.
Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og mugu metast at vera týðandi, um sannlíkindi eru fyri, at tey hvør sær ella saman ávirka tær fíggjarligu støðutakanir, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.
Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tær grannskoðanaratgerðir, sum hesir váðar krevja, og fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru neyðug og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri at týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, ikki verða avdúkaðir, er hægri enn týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.
- Fáa innlit í innanhýsis eftirlitið, sum hevur týdning fyri grannskoðanina fyri at leggja tær grannskoðanaratgerðir til rættis, sum eru nøktandi til umstøðurnar, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til, um tann roknskaparháttur, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar og viðheftu upplýsingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Taka støðu til, um tað er rímiligt, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, og um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa í sambandi við atgerðir og viðurskifti, sum kunnu hava við sær týðandi óvissu, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit vísa á hesi viðurskifti í ársroknskapinum í niðurstøðu okkara ella, um hesar ávísingarnar ikki eru nóg mikið, tillaga okkara niðurstøðu. Niðurstøður okkara byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar í framtíðini ella onnur viðurskiftir kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Taka støðu til ta samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, eisini upplýsingarnar í notunum, og um ársroknskapurin vísir tey grundleggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at ein rættvísandi mynd fæst.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi avdúkingar, herundir um týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit hava eyðmerkt undir grannskoðanini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**
Leiðslan hevur ábyrgdina fyri leiðslufrágreiðingini.

Niðurstøða okkara um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu fyri leiðslufrágreiðingini.

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa, um leiðslufrágreiðingin ikki er í samsvari við ársroknskapin ella er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tongd at týðandi skeivleikum.
Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa, um kravdu upplýsingarnar eftir ársroknskaparlógini, tillagað eftir krøvunum í Faroe Islands FA Club Licensing Regulations, edition 2019 eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í okkara arbeiði er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd eftir ásetingunum í ársroknskaparlógini, tillagað eftir krøvunum

# Váttan frá óheftum grannskoðara

í Faroe Islands FA Club Licensing Regulations, edition 2019. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivar upplýsingar í leiðslufrágreiðingini.

Saltangará, tann 31. januar 2019

**Grannskoðarastovan í Runavík Spf.**
skrásett grannskoðanarvirki

Mark T. Højgaard
skrásettur grannskoðari

# Leiðslufrágreiðing

**Endamál og høvuðsvirksemi**
Endamál og høvuðsvirksemi felagsins er at íðka fótbólt.

**Týdningarmiklar hendingar**
Felagið varð nr. 2 í landskappingini 2018 og vann sær tískil UEFA luttøkuloyvi fyri 2019.

**Ársúrslitið**
Ársúrslitið er -241 tkr. í 2018. Leiðslan er eftir umstøðunum nøgd við úrslitið.

**Fíggjarstøðan**
Eginpeningurin við árslok er 92 tkr., soleiðis at eginpeningurin við árslok 2018 fevnir um 27,2% av samlaðu ognunum.

**Hendingar eftir roknskaparárslok**
Eftir roknskaparárslok eru ikki farnar fram hendingar, sum hava týdning fyri átekningina av ársroknskapinum.

# Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin hjá Nes Sóknar Ítróttarfelag fyri 2018 er gjørd eftir ásetingunum fyri fyritøkur í flokki B í ársroknskaparlógini. Umframt krøvini í ársroknskaparlógini er ársfrásøgnin gjørd eftir ásetingunum í 'Faroe Islands Football Association Club Licensing Regulations, edition 2019'.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

Upphæddirnar í ársfrásøgnini eru í donskum krónum (DKK).

**Um innrokning og virðisáseting**
Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar eins og virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini fær fíggjarliga ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skyldunum kann gerast upp álítandi.

At byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amorteraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprísin og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum vátta ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

## Rakstrarroknskapur

**Inntøkur**
Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin so hvørt sum selt verður.

**Rakstrarkostnaður**
Allur rakstrarkostnaður til høvuðsrakstur felagsins, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførur svarandi til rakstrarárið.

# Nýttur roknskaparháttur

## Fíggjarstøða

**Materiell støðisogn**
Materiell støðisogn verður virðisásett til kostprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð. Grundøki verða ikki avskrivað.

Kostprísurin er útveganarprísur umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini og til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu brúkstíðini:

Rakstrartól og innbúgv: 5 ár

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amorteraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti av væntaðum tapum.

**Tíðaavmarkingar**
Tíðaravmarking verða gjørd fyri allar týðandi inntøkur og kostnaðir.

**Fíggjarligar skyldur**
Við lántøku verður lániskyldan innroknað sum móttikin upphædd við frádrátti av staðfestum transaktiónskostnaðum. Síðani verða fíggjarliga skyldur virðisásettar til amortiseraðan kostprís svarandi til kapitaliserað virði við nýtslu av tí effektivu rentuni, soleiðis at munurin millum móttiknað upphædd og áljóðandi virðið verður innroknað í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Onnur skuld verður virðisásett til amortiseraðan kostprís svarandi til áljóðandi virði.

# Rakstrarroknskapur

| | Nota | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | | *kr.* | *kr.* |
| **Inntøkur** | | | |
| Atgongumerkjasøla | 1 | 401.266 | 550.740 |
| Stuðulsavtalur og lýsingar | 2 | 1.280.873 | 1.280.183 |
| Kringvarpsrættindi | | 0 | 0 |
| Handil (søla, tiltøk vm.) | 3 | 80.131 | 116.591 |
| UEFA solidaritetur og vinningur frá kappingum | | 1.877.168 | 1.796.105 |
| Aðrar rakstrarinntøkur | | 1.137.263 | 1.016.461 |
| **Inntøkur til samans** | | **4.776.701** | **4.760.081** |
| Sølukostnaður | 4 | -137.487 | -291.152 |
| Aðrir rakstrarkostnaðir | 5 | -1.536.516 | -1.911.437 |
| **Bruttovinningur** | | **3.102.698** | **2.557.491** |
| Starvsfólkakostnaður | 6 | -3.283.590 | -2.622.773 |
| **Rakstraravlop** | | **-180.892** | **-65.282** |
| Av- og niðurskrivingar av støðisogn | 7, 8 | -22.222 | 0 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarligar postar** | | **-203.114** | **-65.282** |
| Fíggjarligar inntøkur | | 0 | 0 |
| Fíggjarligar útreiðslur | | -38.350 | -34.522 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **-241.464** | **-99.804** |
| Skattur av ársúrslitinum | | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | | **-241.464** | **-99.804** |

# Fíggjarstøða

## Ogn

| | Nota | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | | *kr.* | *kr.* |
| **Støðisogn** | | | |
| **Immateriell støðisogn** | **7** | **0** | **0** |
| | | | |
| **Materiell støðisogn** | **8** | | |
| Leikvøllur | | 0 | 0 |
| Bygningar | | 0 | 0 |
| Onnur rakstrartól og innbúgv | | 88.887 | 0 |
| **Materiell støðisogn til samans** | | **88.887** | **0** |
| | | | |
| **Fíggjarlig støðisogn** | **9** | **0** | **0** |
| | | | |
| **Onnur støðisogn** | | **0** | **0** |
| | | | |
| **Støðisogn til samans** | | **88.887** | **0** |
| **Ogn í umferð** | | | |
| **Vørugoymsla** | | 0 | 0 |
| **Áogn** | | | |
| Áogn av sølu og tænastu | | 200.198 | 150.145 |
| Áogn hjá samtaksparti ella nærstandandi parti | | 0 | 0 |
| Áogn frá leikaraflyting | | 0 | 0 |
| Skattaáogn | | 0 | 0 |
| Onnur áogn | | 11.592 | 8.000 |
| Tíðaravmarkingar | | 0 | 0 |
| **Áogn til samans** | | **211.790** | **158.145** |
| | | | |
| **Tøkur peningur** | | **37.366** | **225.871** |
| | | | |
| **Ogn í umferð til samans** | | **249.156** | **384.016** |
| | | | |
| **Ogn til samans** | | **338.043** | **384.016** |

## Skyldur

| | Nota | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | | *kr.* | *kr.* |
| **Eginpeningur** | **10** | | |
| Eginpeningur | | 91.879 | 333.343 |
| **Eginpeningur til samans** | | **91.879** | **333.343** |
| **Skuld** | | | |
| **Langfreistað skuld** | | | |
| Lánistovnar | **11** | 0 | 0 |
| Skuld frá leikaraflyting | | 0 | 0 |
| Skuld til sosialar- og skattamyndugleikar | | 0 | 0 |
| Annar skyldugur skattur | | 0 | 0 |
| Langfreistaðar avsetingar | | 0 | 0 |
| Onnur skuld | | 0 | 0 |
| **Langfreistað skuld til samans** | | **0** | **0** |
| **Stuttfreistað skuld** | | | |
| Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | **11** | 0 | 0 |
| Skuld til lánistovnar | **12** | 0 | 0 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 246.164 | 38.039 |
| Skuld til samtakseindir og nærstandandi partar | | 0 | 0 |
| Skuld frá leikaraflyting | | 0 | 0 |
| Skuld til starvsfólk | | 0 | 0 |
| Skuld til sosialar- og skattamyndugleikar | | 0 | 0 |
| Stuttfreistaðar avsetingar | | 0 | 0 |
| Tíðaravmarkingar | | 0 | 0 |
| Onnur skuld | | 0 | 12.634 |
| **Stuttfreistað skuld til samans** | | **246.164** | **50.673** |
| **Skuld til samans** | | **246.164** | **50.673** |
| **Skyldur til samans** | | **338.043** | **384.016** |
| **Netto ogn/skuld** | | **91.879** | **333.343** |
| Veðsetingar, trygdarveitingar og eventualskyldur | **13** | | |

# Peningastreymsyvirlit

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| | *kr.* | *kr.* |
| Úrslit áðrenn rentur | -203.114 | -65.282 |
| Avskrivingar | 22.222 | 0 |
| **Peningastreymur frá primerum rakstri áðrenn broytingar í arbeiðskapitali** | **-180.892** | **-65.282** |
| Broyting í áogn | -53.645 | 39.190 |
| Broyting í ognarum | 208.125 | -175.868 |
| Broyting í aðrari skuld | -12.634 | 16.732 |
| **Peningastreymur frá primerum rakstri** | **-39.046** | **-185.228** |
| Rentuinntøkur | 0 | 0 |
| Rentuútreiðslur | -38.350 | -34.522 |
| **Peningastreymur frá rakstri** | **-77.396** | **-219.750** |
| **Peningastreymur frá íløgum** | | |
| Søla av ognarførdum leikarum | 0 | 0 |
| Keyp av ognarførdum leikarum | 0 | 0 |
| Søla av materiellari støðisogn | 0 | 0 |
| Keyp av materiellari støðisogn | -111.109 | 0 |
| Aðrar broytingar í tøkum peningi frá íløgum | 0 | 0 |
| **Peningastreymur frá íløgum til samans** | **-111.109** | **0** |
| **Peningastreymur frá fígging** | | |
| Upptøka ella hækkan av láni frá fíggjarstovni | 0 | 0 |
| Afturrindan av langfreistaðari skuld til fíggjarstovn | 0 | 0 |
| Broyting í láni frá eigara ella nærstandandi parti | 0 | 0 |
| Hækkan av eginpeningi | 0 | 0 |
| Útgoldið vinningsbýti | 0 | 0 |
| Broytingar í tøkum peningi frá fígging | 0 | 0 |
| **Peningastreymur frá fígging til samans** | **0** | **0** |
| **Annar peningastreymur** | | |
| Broytingar í tøkum peningi frá øðrum virksemi | 0 | 0 |
| **Peningastreymur frá øðrum virksemi til samans** | **0** | **0** |
| **Peningastreymur til samans fyri tíðarskeiðið** | **-188.505** | **-219.750** |
| Tøkur peningur við ársbyrjan | 225.871 | 445.621 |
| Tøkur peningur við árslok | 37.366 | 225.871 |
| Tøkur peningur sambært fíggjarstøðu | 37.366 | 225.871 |
| Avstemman | 0 | 0 |

# Notur til ársroknskapin

| Nota | | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | | *kr.* | *kr.* |
| 1 | **Atgongumerkjasøla** | | |
| | Heimligu kappingarnar | 315.313 | 413.412 |
| | UEFA-kapping | 37.003 | 34.279 |
| | Atgongumerkjasøla - Limagjald | 48.950 | 103.049 |
| | Onnur atgongumerkjasøla | 0 | 0 |
| | **Atgongumerkjasøla til samans** | **401.266** | **550.740** |
| 2 | **Stuðulsavtalur og lýsingar** | | |
| | Høvuðsstuðul | 150.000 | 150.000 |
| | Aðrir stuðlar | 931.414 | 957.988 |
| | Leikvallarstuðul | 0 | 0 |
| | Lýsingar við vøllin | 199.459 | 172.195 |
| | **Stuðul og lýsingar til samans** | **1.280.873** | **1.280.183** |
| 3 | **Handil (søla, tiltøk vm.)** | | |
| | Heimligu kappingarnar | 80.131 | 116.591 |
| | Marknaðarføring | 0 | 0 |
| | **Handil (søla, tiltøk vm.) til samans** | **80.131** | **116.591** |
| 4 | **Sølukostnaður** | | |
| | Vørukeyp | 70.351 | 83.423 |
| | Aðrar beinleiðis útreiðslur | 67.136 | 207.729 |
| | **Sølukostnaður til samans** | **137.487** | **291.152** |
| 5 | **Aðrir rakstrarkostnaðir** | | |
| | Útreiðslur á leikdegi | 93.000 | 87.900 |
| | Útreiðslur til stuðlar og lýsingar | 17.406 | 21.472 |
| | Útreiðslur til handil | 0 | 0 |
| | Útreiðslur av materiellum ognum | 0 | 320 |
| | Aðrar rakstrarútreiðslur | 1.426.110 | 1.801.746 |
| | **Aðrir rakstrarkostnaðir til samans** | **1.536.516** | **1.911.437** |

| | | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | | *kr.* | *kr.* |
| 6 | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | Lønir - leikarar | 2.332.400 | 1.754.200 |
| | Lønartengd gjøld - leikarar | 127.921 | 84.019 |
| | Onnur lønargjøld - leikarar | 0 | 0 |
| | *Lønir og lønargjøld til leikarar í alt* | *2.460.321* | *1.838.219* |
| | Lønir - onnur starvsfólk | 812.340 | 770.000 |
| | Lønartengd gjøld - onnur starvsfólk | 10.929 | 14.554 |
| | Onnur lønargjøld - onnur starvsfólk | 0 | 0 |
| | *Lønir og lønargjøld til onnur starvsfólk í alt* | *823.269* | *784.554* |
| | **Starvsfólkakostnaður í alt** | **3.283.590** | **2.622.773** |

| | | *Leikarar* | *Aðrar im-materiellar ognir* | *Til samans* |
|---|---|---|---|---|
| 7 | **Immateriell støðisogn** | | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 0 | 0 | 0 |
| | Tilgongd í árinum | 0 | 0 | 0 |
| | Frágongd í árinum | 0 | 0 | 0 |
| | Keypsvirði við árslok | 0 | 0 | 0 |
| | Uppskrivingar við ársbyrjan | 0 | 0 | 0 |
| | Uppskrivingar í árinum | 0 | 0 | 0 |
| | Uppskrivingar í árinum | 0 | 0 | 0 |
| | Uppskrivingar við árslok | 0 | 0 | 0 |
| | Av- og niðurskrivingar við ársbyrjan | 0 | 0 | 0 |
| | Av- og niðurskrivingar í árinum | 0 | 0 | 0 |
| | Av- og niðurskr. viðvíkjandi seldum ognum | | 0 | 0 |
| | Av- og niðurskrivingar við árslok | 0 | 0 | 0 |
| | **Roknskaparligt virði við árslok** | **0** | **0** | **0** |

Avskrivingartíðaskeið

Felagið hevur ikki selt immateriellar ognir í árinum og hevur tískil hvørki vinning ella tap í hesum sambandi í roknskaparárinum.

**8 Materiell støðisogn**

| | Leikvøllur | Bygningar | Onnur rakstrartól og innbúgv | Til samans |
|---|---|---|---|---|
| Keypsvirði við ársbyrjan | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 0 | 111.109 | 111.109 |
| Frágongd í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Keypsvirði við árslok | 0 | 0 | 111.109 | 111.109 |
| | | | | |
| Uppskrivingar við ársbyrjan | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Uppskrivingar í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Uppskrivingar í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Uppskrivingar við árslok | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | | | | |
| Av- og niðurskrivingar við ársbyrjan | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Av- og niðurskrivingar í árinum | 0 | 0 | 22.222 | 22.222 |
| Av- og niðurskr. viðvíkjandi seldum ognum | | 0 | 0 | 0 |
| Av- og niðurskrivingar við árslok | 0 | 0 | 22.222 | 22.222 |
| | | | | |
| **Roknskaparligt virði við árslok** | **0** | **0** | **88.887** | **88.887** |
| | | | | |
| Avskrivingartíðaskeið | 10 ár | 20 ár | 5 ár | |

Felagið hevur ikki selt materiellar ognir í árinum og hevur tískil hvørki vinning ella tap í hesum sambandi í roknskaparárinum. *(Minst til at upplýsa, um felagið hevur vinning ella tap av sølu av materiellari støðisogn)*

**9 Fíggjarlig støðisogn**

Felagið hevur ikki gjørt íløgur í fíggjarliga støðisogn.

| | **2018** | **2017** |
|---|---|---|
| | *kr.* | *kr.* |
| **10 Eginpeningur** | | |
| Partapeningur | 0 | 0 |
| Grunnar | 0 | 0 |
| | | |
| Fluttur vinningur við ársbyrjan | 333.343 | 433.146 |
| Ársúrslit | -241.464 | -99.804 |
| Fluttur vinningur við árslok | 91.879 | 333.343 |
| | | |
| **Eginpeningur til samans** | **91.879** | **333.343** |
| | | |
| **11 Langfreistað skuld til lánistovnar** | | |
| Skuld til lánistovnar | 0 | 0 |
| Herav avdráttir komandi ár | 0 | 0 |
| | | |
| **Langfreistað skuld** | **0** | **0** |

12 **Skuld til lánistovnar**

| | | |
|---|---|---|
| Kassakredittur | 0 | 0 |
| Onnur lán | 0 | 0 |
| **Skuld til lánistovnar til samans** | **0** | **0** |

Felagið hevur onga skuld til lánistovnar við árslok.

13 **Veðsetingar, trygdarveitingar og eventualskyldur**

Tað eru ongar veðsetingar, trygdarveitingar ella eventualskyldur í felagnum.

# Notur uttan tilvísing

**Kapitalpartar**
Felagið hevur ikki gjørt íløgur í kapitalpartar í øðrum feløgum.

**Avsetingar**
Felagið hevur ikki avsetingar við árslok.

**Ráðandi felag**
Onki annað felag hevur ræði á ella stýrir felagnum.

**Transaktiónir við nærstandandi partar**
Felagið hevur ikki havt transaktiónir við nærstandandi partar í roknskaparárinum, sum ikki hava verið til marknaðartreytir.

| **Aðrir upplýsingar** | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| Gjald til leikaraumboðsfólk | 0 | 0 |
| Fíggjarlig rættindi hjá leikarum | 0 | 0 |
| Skattaútreiðslur | 0 | 0 |
| Annað | 0 | 0 |
| **Aðrir upplýsingar til samans** | **0** | **0** |